SPEKT | løggildir grannskoðarar

# UTTANLANDSINNTØKUR

## Vegleiðing 2020

## Uttanlandsinntøkur

Tá ið persónar fara uttanlands at arbeiða eru nógv viðurskifti at fáa greiðu á, herundir hvat skal gjaldast í skatti, sosialum gjøldum og eftirløn í Føroyum og í útlandinum.

Sum hjálp til at fáa greiðu á nøkrum av viðurskiftunum hava vit tí gjørt hesa vegleiðing.

Henda vegleiðing er ein yvirskipað gjøgnumgongd av ymiskum viðurskiftum hjá persónum, ið antin arbeiða uttanlands ella arbeiða í Føroyum fyri útlendskan arbeiðsgevara, ella á annan hátt hava útlendska inntøku.

Serligur dentur er lagdur á at lýsa viðurskiftini í sambandi við arbeiði í øðrum norðurlondum. Av tí at nógvir føroyingar arbeiða í Noreg, ella fyri norskan arbeiðsgevara, er eisini nærri greitt frá ymiskum viðurskiftum í Noreg.

Talan er ikki um fullfíggjaða gjøgnumgongd. Vegleiðingin er ætlað at kunna um skattlig viðurskifti, ið eru viðkomandi hjá persónum við uttanlandsinntøkum.

Viðurskifti í sambandi við uttanlandsinntøkur kunnu vera torgreið, og eiga avgerðir tí ikki at verða tiknar einans grundað á innihaldið í hesi vegleiðing.

Um tørvur er á hjálp viðvíkjandi útfyllan av sjálvuppgávu ella leiðbeining innan skattaviðurskifti í sambandi við uttanlandsinntøkur ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á spekt@spekt.fo ella


| | |
|---|---|
| Staravegur 17 | Stangaskákið 1 |
| 100 Tórshavn | 700 Klaksvík |
| tlf. 34 34 34 | tlf. 34 34 35 |


**Desember 2020**

© 2020, Sp/f SPEKT Løggildir Grannskoðarar, er eitt løggilt grannskoðanarvirki, sum umframt at grannskoða veitir tænastur so sum skatt, bókhald, MVG, roknskap, XBRL, KT-grannskoðan, vinnuráðgeving v.m. Kundaskarin er breiður og fevnir um bæði persónar, vinnuvirki, landsstovnar og kommunur.

# Innihaldsyvirlit


| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sjálvuppgáva | 2 |
| 1.1 | Upplýsingarskyldur | 2 |
| 1.2 | Sjálvuppgáva | 2 |
| 1.3 | Fylgiskjøl til uttanlandsinntøku | 2 |
| 1.4 | Fyribilsskattaskrá | 4 |
| 1.5 | Eykagjald á írestandi skatti | 4 |
| 1.6 | Egið v-tal til uttanlandsinntøku frá norðurlendskum fiskiskipum | 4 |
| 1.7 | Sjálvuppgáva í útlandinum | 4 |
| 2 | Skattur í útlandinum | 6 |
| 2.1 | Skattur av løn í útlandinum | 6 |
| 3 | Inntøkur | 7 |
| 3.1 | Lønarinntøka fyri arbeiðið á landi uttanlands | 7 |
| 3.2 | Lønarinntøka fyri arbeiðið umborð á útlendskum skipum | 7 |
| 3.3 | Lønarinntøka fyri arbeiðið umborð á útlendskum flogfari | 8 |
| 3.4 | Nevndarsamsýningar | 8 |
| 3.5 | Eftirlønir | 9 |
| 3.6 | Alderspensjón úr Noreg | 9 |
| 3.7 | Pensjonstrygd for sjømenn (PTS) | 10 |
| 3.8 | Sjúkrapeningur | 11 |
| 3.9 | Sjúkrapeningur úr Noreg | 11 |
| 4 | Frádráttir í skattskyldugu inntøkuni | 12 |
| 4.1 | Uttanlandsfrádráttur | 12 |
| 4.2 | Samdøgursfrádráttur | 12 |
| 4.3 | Fiskimannafrádráttur | 12 |
| 4.4 | Yvirlit yvir frádráttir í skattskyldugu inntøkuni | 13 |
| 4.5 | Eftirlønarfrádráttur | 13 |
| 5 | Skattur í Føroyum | 14 |
| 5.1 | Linking fyri goldnan skatt uttanlands | 14 |
| 5.2 | Eksemption | 14 |
| 5.3 | Kredit | 15 |
| 6 | Sosial gjøld í útlandinum | 16 |
| 6.1 | Sosial gjøld í Noreg | 16 |
| 7 | Gjald til eftirløn í Føroyum | 18 |
| 7.1 | Frítøka fyri at gjalda til føroyska eftirløn | 19 |

# 1 Sjálvuppgáva

## 1.1 Upplýsingarskyldur

Persónur, sum fer uttanlands at arbeiða, hevur sum útgangsstøði somu skyldur yvir fyri føroysku skattamyndugleikunum, sum aðrir persónar við føroyskum inntøkum. Harafturat hava persónar við uttanlandsinntøkum eisini skyldu til at senda TAKS serstakar upplýsingar í sambandi við uttanlands inntøkur.

## 1.2 Sjálvuppgáva

Upplýsingar um útlendsk inntøkuviðurskifti verða ikki sjálvvirkandi fráboðað TAKS.

Persónur, sum hevur inntøku uttanlands, hevur skyldu til at uppgeva útlendsku inntøkuna í Føroyum. Útlendska inntøkan skal uppgevast á føroysku sjálvuppgávuni, sum skal latast TAKS í seinasta lagi 1. mai árið eftir at inntøkan er vunnin. Í sambandi við innlating av sjálvuppgávuni skulu persónar við útlendskari inntøku útfylla og viðleggja fylgiskjal til sjálvuppgávuna, har upplýsast skal um m.a. land, tíðarskeið, og arbeiðsgevara umframt inntøku og goldnan skatt í útlandinum. Í summum førum kann vera krav um at viðleggja fleiri fylgiskjøl saman við sjálvuppgávuni. Møguleiki er fyri at lata sjálvuppgávuna inn á www.borgaragluggin.fo

Inntøka og skattur skul gevast upp í fremmandum gjaldoyra, ið síðan verður umroknað til danskar krónur við miðalkursi fyri árið. Inntøka og møguliga goldin skattur í útlandinum eru vanliga víst á lønarseðli ella ársuppgerð frá arbeiðsgevara.

Um persónur ikki fær sent TAKS endaligu upplýsingarnar um útlendsku inntøkuna og útlendska skattin, t.d. tí at endalig álíkning ikki er gjørd í útlandinum, kann viðkomandi søkja TAKS um útsetan av innlatingarfreistini í Føroyum.

## 1.3 Fylgiskjøl til uttanlandsinntøku

Fylgiskjøl til uttanlandsinntøkur finnast á heimasíðuni hjá TAKS (www.taks.fo). Fylgiskjølini eru ymisk alt eftir um uttanlandsinntøkan stavar frá arbeiði á landi, skipi ella flogfari.

Niðanfyri er yvirlit yvir hvørji fylgiskjøl skulu latast TAKS saman við sjálvuppgávuni.

## Fylgiskjøl til uttanlandsinntøkur

**701** Lønarinntøka á landi fyri útlendskan arbeiðsgevara uttanlands ella føroyskan arbeiðgevara við føstum rakstrarstaði uttanlands. Lønarinntøka fyri arbeiði í Føroyum útint fyri útlendskan arbeiðsgevara skal somuleiðis uppgevast á hesum fylgiskjali

**715** Eftirlønarinntøka, almenn pensjón, lívrenta, lutaeftirløn

**730** Nevndarsamsýningar

**740** Lønarinntøkur fyri alment starv uttanlands, so sum løn frá útlendskum almennum stovnum umframt veitingar til sendifólk

**744** Lønarinntøka umborð á flogfari ella tyrlu, undantikið virksemi knýtt at kolvetnisvinnu

**748** Onnur inntøka, so sum sjúkapeningur, barnapeningur og arbeiðsloysispeningur úr útlondum.

**750** Fiskiveiðuinntøka, bæði úr Norðurlondum og aðrastaðni

**760** Lønarinntøka frá virksemi innan kolvetnisvinnu við skipi ella á boruplattformi. Talan er um arbeiði í samband við m.a. forkanning, rannsókn, seismikk, undirsjóvararbeiði, akkersarbeiði, boriarbeiði o.t. ið hevur tilknýti til útvinnan av kolvetni - Lønarinntøka frá supply skipum og tyrlum skal gevast upp á øðrum fylgiskjali

**765** Lønarinntøka frá ferða- ella farmasigling, herundir supply skip og tyrlur við tilknýti til kolvetnisvinnu

**770** Lønarinntøka frá øðrum skipum, sum ikki reka virksemi innan kolvetnisvinnu, so sum m.a. brunnbátar, sandbátar, vindmylluskip, skip í innanríkissigling, skip í DAS o.o.

**780** Lønarinntøka frá skipum undir DIS

**791** Inngjald til eftirlønir – skal bert útfyllast um viðkomandi er frítikin at rinda til føroyskan eftirlønarveitara

## 1.4 Fyribilsskattaskrá

Persónar, ið hava útlendska lønarinntøku ella fáa útgoldið pensjón ella aðrar veitingar uttanlands, eiga at boða TAKS frá, hvussu stór útlendska inntøkan væntandi verður, og um skattur verður goldin í útlandinum. Útlendsk inntøka og møguligur útlendskur skattur kunnu uppgevast á serstøkum oyðublaði til fyribilsskattaskráseting.

Útlendskar inntøkur skulu fráboðast til TAKS beinanvegin, hóast tær verða skattaðar uttanlands. Hetta av tí at inntøkurnar eisini verða íroknaðar í skattskyldugu inntøkuna í Føroyum, og ávirka sostatt útroknaða skattin í Føroyum. Um persónur ikki upplýsir um útlendsku inntøkuna beinanvegin, men bíðar til sjálvuppgávan skal latast inn, kann viðkomandi fáa størri írestandi skatt, tá ið endaliga skattauppgerðin verður gjørd.

## 1.5 Eykagjald á írestandi skatti

Írestandi skattur er tann upphædd ið endaligi skatturin er hægri enn fyribilsskatturin. Um persónur bert hevur uttanlandsinntøku, ið ikki er fráboðað til TAKS við fyribilsskattaskrá, verður skattur ikki rindaður í árinum. Útroknaði føroyski skatturin av uttanlandsinntøkuni verður tí til írestandi skattur við ársenda. Hevur persónur írestandi skatt við ársenda, fellur hesin til gjaldingar í trimum gjøldum í árinum eftir at inntøkan er vunnin. Afturat írestandi skatti skal gjaldast 4% í eykagjaldi. Verður írestandi skatturin sjálvboðin goldin áðrenn 31. januar í árinum eftir at inntøkan er vunnin, slepst undan at rinda eykagjald upp á 4 % av írestandi skattinum.

## 1.6 Egið v-tal til uttanlandsinntøku frá norðurlendskum fiskiskipum

Persónar, sum hava lønarinntøkur frá norðurlendskum fiskiskipum, kunnu fáa egið v-tal frá TAKS og harvið rinda A-skatt í Føroyum av útlendsku fiskiveiðuinntøkuni.

Skipanin virkar á tann hátt, at persónur sum hevur fiskiveiðuinntøku úr øðrum norðurlondum, kann søkja TAKS um at fáa egið v-tal. Hetta v-talið kann síðani verða knýtt at konto í føroyskum peningastovni. Tá persónurin, ella hansara útlendski arbeiðsgevari, flytur løn á hesa konto, verður A-skattur eftirhildin og avroknaður til landskassan. Skipanin er ein valmøguleiki, og persónar sum velja at nýta hesa skipan nýtast ikki at skráseta uttanlandsinntøkuna sum B-inntøku í fyribilsskattaskránni. Skipanin kann verða hent at nýta í teimum førum, tá ið skattur ikki skal gjaldast í útlandinum.

Tað skal tó gerast vart við, at hóast A-skattur verður rindaður av uttanlandsinntøkuni, er inntøkan framvegis at rokna sum ein B-inntøka, og hava persónar, sum nýta hesa skipan, tí framvegis skyldu til at innsenda sjálvuppgávu saman við fylgjsskjali. Um lønarseðlar ella ársuppgerð fyri uttanlandsinntøkuna vísa aðra upphædd, enn ávíst er um A-skattaskipanina, eru tað upplýsingarnar á lønarseðlinum ella ársuppgerðini, sum skulu uppgevast sum skattskyldug inntøka fyri árið.

## 1.7 Sjálvuppgáva í útlandinum

Persónar, sum fara uttanlands at arbeiða, eiga at kanna eftir, um teir skulu lata sjálvuppgávu ella aðrar upplýsingar til skattamyndugleikarnar í útlandinum. Reglurnar

hesum viðvíkjandi kunnu verða ymiskar frá landi til land. Persónar við uttanlandsinntøku kunnu hava rætt til frádrátt í útlandinum í skattskyldugu inntøkuni ella fyri útreiðslur við tilknýti til inntøkuna. Umráðandi er tí at kanna, um viðkomandi fær ágóðan av møguligum frádráttum í arbeiðslandinum.

# 2 Skattur í útlandinum

Tá ið persónar fara uttanlands at arbeiða, er tað týdningarmikið at vera vitandi um skattareglurnar í arbeiðslandinum, umframt reglur í arbeiðslandinum fyri rindan av sosialum gjøldum.

## 2.1 Skattur av løn í útlandinum

Í Føroyum er skattgjalding grundað á globalmeginregluna. Hetta merkir, at persónar, sum búgva í Føroyum, hava skyldu at rinda skatt í Føroyum av allari vunnari inntøku, eisini inntøku sum er vunnin uttanlands. Løn fyri arbeiði útinnt uttanlands skal tí eisini uppgevast og skattast í Føroyum, eins og onnur inntøka vunnin í Føroyum.

Um persónurin skal gjalda skatt í útlandinum viðførir hetta, at løn og aðrar samsýningar kunnu gerast skattskyldug inntøka bæði í Føroyum og í útlandinum. Fyri at sleppa undan, at sama inntøka verður skattað í tveimum londum, áseta tvískattasáttmálar hvat fyri land hevur rætt at skatta ávísu inntøkuna.

Reglurnar í einum tvískattasáttmála uppbýta rættin at skatta ymisk sløg av inntøkum millum bústaðarlandið og arbeiðslandið og áseta samstundis, hvussu frádráttur skal gevast í skattinum hjá bústaðarlandinum fyri goldnan skatt í arbeiðslandinum. Ymiskar reglur eru galdandi alt eftir hvar arbeitt verður, hvussu leingi arbeitt verður uttanlands, hvar arbeiðsgevarin er heimahoyrandi og um arbeitt verður á landi ella á sjógvi.

Føroyar hava tvískattasáttmála við hini norðurlondini, Grønland, Stóra Bretland, Sveis og India.

Har Føroyar ikki hava tvískattasáttmála við eitt land, áseta innanhýsis skattareglur í Føroyum, at frádráttur skal gevast í føroyska skattinum fyri goldnan skatt uttanlands.

# 3 Inntøkur

## 3.1 Lønarinntøka fyri arbeiðið á landi uttanlands

Hjá persónum, sum hava bústað í Føroyum, kunnu lønarinntøkur í sambandi við arbeiði í øðrum landi, sum hevur tvískattasáttmála við Føroyar, sum útgangsstøði bert skattast í Føroyum. Tílíkar lønarinntøkur kunnu tó skattast í tí landi har ið arbeiðið er gjørt, um ein av niðanfyristandandi treytum er uppfylt:

- Persónurin uppiheldur sær í arbeiðslandinum í einum ella fleiri tíðarskeiðum í til samans meira enn 183 dagar innanfyri eitt tíðarskeið upp á 12 mánaðir.
- Lønin verður goldin av einum arbeiðsgevara, sum er heimahoyrandi í arbeiðslandinum.
- Lønin verður goldin av einum føroyskum arbeiðsgevara, sum hevur fastan rakstrarstað í arbeiðslandinum.
- Persónurin er útleigaður frá føroyskum arbeiðsgevara til útlendskan arbeiðsgevara í arbeiðslandinum.

Um ongin av hesum treytum er uppfylt, kann lønarinntøkan bert skattast í Føroyum.

Tá arbeitt verður í landi, sum ikki hevur tvískattasáttmála við Føroyar, eru tað reglurnar í arbeiðslandinum sum avgera, um skattur skal gjaldst har ella ikki. Reglurnar kunnu vera sera ymiskar, men vanligt er, at um arbeitt verður fyri arbeiðsgevara, sum er heimahoyrandi í arbeiðslandinum, skal starvsfólkið rinda skatt í arbeiðslandinum av allari lønarinntøkuni frá fyrsta degi.

## 3.2 Lønarinntøka fyri arbeiðið umborð á útlendskum skipum

Inntøka fyri arbeiði umborð á útlendskum skipi kann antin verða skattað í tí landi har skipið er skrásett ella í tí landi har persónurin hevur bústað. Í ávísum førum kann inntøkan eisini verða skattað í tí landi, har reiðaríið, sum rekur skipið, er heimahoyrandi. Ymiskar reglur eru fyri ferða- og farmaskip, fiskiskip og skip í kolvetnisvinnuni.

### Fiskiskip

Lønarinntøka fyri arbeiði umborð á norðurlendskum fiskiskipum kann bert skattast í tí landinum, har persónurin hevur bústað. Hetta merkir at føroyingar, sum sigla við fiskiskipum í øðrum norðurlondum, skulu bert rinda skatt í Føroyum í hesum sambandi. Harafturímóti kann lønarinntøka fyri arbeiði umborð á grønlendskum ella bretskum fiskiskipum skattast í Grønlandi ella Stóra Bretlandi.

### Ferðamanna- ella farmaskip

Lønarinntøka fyri arbeiði umborð á ferðamanna- ella farmaskipi í altjóða ferðslu kann sum meginregla skattast í tí landinum har reiðaríið er heimahoyrandi. Fyri Norðurlond er meginreglan tó, at slík inntøka bert kann skattast í tí norðurlandi har skipið er skrásett og hevur tjóðarprógv. Um eitt tílíkt skip er skrásett við flaggi í øðrum landi, men er leigað av reiðaríi, sum er heimahoyrandi í norðurlandi, kann inntøkan skattast í tí landinum har reiðaríið er heimahoyrandi, uttan mun til hvar ið skipið annars er skrásett.

Hugtakið “altjóða ferðsla” merkir flutningur við skipi ella flogfari, undantikið tá ið skipið bert verður nýtt millum støð í sjóøki hjá landi, sum Føroyar hevur tvískattasáttmála við. Eitt skip er í altjóða ferðslu, tá ið høvuðsuppgávan hjá skipinum er at flyta fólk ella farm fyri fremmanda rokning.

Skip, ið ikki sigla við farmi ella ferðafólki, men har høvuðsuppgávurnar eru m.a. umsjón, eftirlit, umvælingar, viðlíkahald o.a. eru ikki í altjóða sigling, hóast tey sigla í altjóða sjógvi.

### Skip í kolvetninsvinnu

*Norðurlond - subsea, standby, ankerhandling o.t.*
Lønarinntøka fyri arbeiði umborð á skipum í kolvetnisvinnuni, so sum subsea-, standby- og ankerhandling skipum, kann skattast í landinum, har reiðaríið er heimahoyrandi. Um talan er um norðurlendskt skip, ið siglir uttan fyri norðurlendskt sjóøki, kann tílík inntøka tó bert skattast í Føroyum uttan mun til um skipið ella reíðaríið er heimahoyrandi í øðrum norðurlandi.

*Norðurlond – supply*
Norðurlendsk supply skip, ið sigla uttanfyri norðurlendskt sjóøki eru í altjóða ferðslu og kann lønarinntøkan sum meginregla skattast í tí landinum har skipið er skrásett. Norðurlendsk supply skip, ið sigla innan fyri norðurlendskt sjóøki fylgja somu reglum sum onnur skip í kolvetnisvinnuni, sí omanfyri.

*Onnur lond*
Tá arbeitt verður umborð á skipum, sum ikki eru skrásett í landi, sum hevur tvískattasáttmála við Føroyar, kunnu reglurnar í landinum, har skipið er skrásett, verða avgerandi fyri um skattur skal gjaldast í útlandinum ella ikki. Nógv útlendsk skip eru tó skrásett við fremmandum flaggi. Hetta merkir ofta, at skipið er skrásett í einum landi, sum hevur lagaligar skattareglur fyri manningina, og sum oftast viðførir hetta, at eingin skattur verður goldin í útlandinum. Í slíkum førum verður inntøkan skattað í Føroyum eftir føroyskum reglum.

## 3.3 Lønarinntøka fyri arbeiðið umborð á útlendskum flogfari

Inntøka fyri arbeiði útinnt umborð á flogførum, heimahoyrandi í landi sum Føroyar hava tvískattasáttmála við, kann antin verða skattað í tí landi har felagið, ið rekur flogfarið, er heimahoyrandi, ella í tí landi har persónurin hevur bústað.

Lønarinntøka fyri arbeiði umborð norðurlendskum flogførum er tó einans skattskyldug har viðkomandi persónur er heimahoyrandi, uttan mun til um talan er um innanríkis- ella altjóða ferðslu.

## 3.4 Nevndarsamsýningar

Nevndarsamsýningar frá feløgum í londum, sum hava tvískattasáttmála við Føroyar, herundir tey norðurlendsku londini, skal skattast í landinum, har felagið er heimahoyrandi. Nevndarsamsýningar frá feløgum í londum, sum ikki hava tvískattasáttmála við Føroyar, verður skatta eftir galdandi reglum í viðkomandi landi, har felagið er heimahoyrandi.

## 3.5 Eftirlønir

Eftirløn, pensjón og aðrar aldurstryggjaðar veitingar, ið persónur fær útgoldið í sambandi við útint arbeiði uttanlands, verða oftast skattaðar í útlandinum.

Tílíkar eftirlønarinntøkur eru eisini skattskyldugar í Føroyum og skulu uppgevast á føroysku sjálvuppgávuni. Skattur av eftirlønum er tengdur at, um Føroyar hava tvískattasáttmála við landið, har eftirlønin verður útgoldin, og hvat fyri slag av pensjón talan er um. Innanfyri norðurlond eru reglurnar um skatt av eftirlønum og pensjónum ymiskar alt eftir hvørjum norðurlandi eftirlønin verður útgoldin frá og hvar móttakarin býr.

Serligar reglur galda fyri eftirlønir úr Danmark, har rætturin til at skatta eftirlønina verður býttur millum Føroyar og Danmark alt eftir hvar móttakarin hevur havt bústað, meðan goldið varð til eftirlønarskipanina.

## 3.6 Alderspensjón úr Noreg

Fyri at hava rætt til alderspensjon frá Folketrygden skal viðkomandi hava arbeitt í Noreg í minst 3 ár, og hava verið fevndur av norsku Folketrygden ella fingið pensjónsgevandi løn í Noreg.

Støddin á útgjaldinum er tengd at hvussu leingi viðkomandi persónur hevur arbeitt í Noreg og hvussu nógv viðkomandi hevur forvunnið. Alderspensjon er lívlang veiting og fellur burtur við deyða. Útgjald av alderspensjon byrjar, tá ið persónur hevur nátt pensjónsaldur, ið er 67 ár í Noreg. Tó kann útgjald byrja áðrenn pensjónsaldur, men kann í fyrsta lagi byrja eftir at viðkomandi persónur er vorðin 62 ár.

Føroyskir sjómenn við norskum fiskiskipum hava sum útgangsstøði ikki rætt til alderspensjón úr Noreg, hóast teir rinda til Folketrygden. Royndir hava tó víst, at føroyskir sjómenn við norskum fiskiskipum allíkavæl spara upp til norska alderspensjón. Tá so er, hava teir rætt til at fáa uppspardu upphæddina útgoldna.

Við MinID atgongd ber til at kanna uppspardu pensjónsupphæddina í Noreg á heimasíðuni hjá NAV (www.nav.no).

Alderspensjón úr Noreg verður bert útgoldin eftir umsókn. Almannaverkið í Føroyum avgreiðir umsóknir vegna persónar, sum búgva í Føroyum. Persónar, sum hava rætt til at fáa útgoldið norska alderspensjón, skulu tí venda sær til Almannaverkið.

Sum útgangsstøði kann persónur ikki samstundis vinna rætt til pensjón í tveimum norðurlondum, herundir alderspensjón í Noreg og fólkapensjón í Føroyum. Rættur til norska alderspensjón kann tí viðføra skerjingar í rætti til føroyska fólkapensjón.

Útgoldin alderspensjón er skattskyldug í Noreg. Um móttakarin hevur bústað í Føroyum, verður 15% rindað í skatti í Noreg av útgoldnu upphæddini. Í Føroyum skal alderspensjónin eisini uppgevast sum skattskyldug inntøka, men verður frádráttur givin í føroyska skattinum, tó í mesta lagi fyri tann skatt, ið fellur á pensjónsinntøkuna (kredit linking).

## 3.7 Pensjonstrygd for sjømenn (PTS)

Pensjonstrygd for sjømenn er ískoyti til lønarinntøkuna í Noreg. Ríkisborgarar í EU/EØS, ella persónar búsitandi í norðurlondum, ið arbeiða umborð á skipi í norsku skipaskrásetingini (NOR ella NIS), ið er yvir 100 bruttotons, rinda til PTS. Sjómenn umborð á skipum, ið eru undir 100 bruttotons, skulu í ávísum førum eisini rinda til PTS.

PTS pensjón verður bert útgoldin eftir umsókn. Persónar skulu sjálvir senda umsókn til PTS. Hetta kann gerast á (www.pts.no).

Við virkna frá 1. januar 2020 eru pensjónsviðurskiftini í PTS býtt í tvær skipanir, og eru ymsar treytir knýttar at útgjaldi, alt eftir um limur er føddur áðrenn ella eftir 1970.

### Útgjald til limir føddir áðrenn 1970

Rætturin til útgjald er treytaður av minst 150 mánaðar siglingartíð. Útgjaldið er ymiskt treytað av um móttakarin er yvirmaður ella dekkari.

Um viðkomandi hevur millum 12-149 mánaðar siglingstíð, er møguligt at roknað við siglingstíð frá øðrum skipum í EU og norðurlondum upp til 150 mánaðar. Siglingstíð umborð á øðrum skipum enn norskum telur tó ikki við, tá ið útgjaldsupphæddin verður ásett.

Útgjald byrjar sum útgangsstøði, tá ið viðkomandi er vorðin 62 ár. Tó kann útgjald í ávísum førum byrja, tá ið viðkomandi er vorðin 60 ár og í einstøkum førum, tá ið viðkomandi er 55 ár.

Útgjald í tíðarskeiðinum 62 til 67 ár er óheft av øðrum lønarinntøkum. Viðkomandi kann sostatt framvegis hava lønarinntøku av skipi uttan at hetta ávirkar PTS-útgjaldið. Útgjald til persónar, føddir áðrenn 1970, heldur uppat tá ið viðkomandi fyllir 67 ár, og viðkomandi í staðin fær alderspensjon frá Folketrygden.

### Útgjald til limir føddir eftir 1970

Rætt til útgjald hevur limur frá 62 ára aldur, treytað av 3 ára uppsparingartíð. Tænasta umborð á øðrum skipum í EU ella Norðurlondum verður roknað við upp til 3 ár. Uppsparingartíð umborð á øðrum skipum enn norskum telur tó ikki við, tá ið útgjaldsupphæddin verður ásett.

Útgjald kann í fyrsta lagi byrja við 62 ára aldur, og heldur sum útgangsstøði fram til viðkomandi er vorðin 70 ár. Útgjaldstíðarskeiðið kann ikki verða styttri enn 7 ár, umframt at útgjald ikki kann byrja eftir 70 ára aldur. Persónar kunnu velja at fáa útgjaldið fram til 80 ára aldur, tó at útgoldna upphæddin tá lækkar tilsvarandi.

Útgjaldið er óheft av øðrum lønarinntøkum. Viðkomandi kann sostatt framvegis hava lønarinntøku av skipi uttan at hetta ávirkar útgjaldið. Útgjaldið fyri limir, føddir eftir 1970, er ikki tengt at, um viðkomandi fær alderspensjon, og kann viðkomandi tí móttaka alderspensjon eftir 67 ára aldur uttan at hetta ávirkar PTS útgjaldið.

Limir føddir eftir 1970 kunnu eisini hava rætt til AFP pensjón frá 62 ára aldri afturat PTS pensjónini. AFP pensjón er ein lívlang veiting. Ávísar treytir skulu tó verða uppfyltar, m.a.

skal løntakari verða í starvi við 62 ára aldur. Til ber at lesa meira um AFP pensjón á (www.afp.no).

Limir í PTS, føddir áðrenn 1970, men sum hava inngoldið fyrstu ferð til skipanina eftir 1. januar 2020 fylgja somu reglum, sum limir føddir eftir 1970.

## 3.8 Sjúkrapeningur

Sjúkrapeningur og aðrar sosialar veitingar úr hinum norðurlondunum verða sum útgangsstøði skattaðar í tí norðurlandi veitingin stavar frá. Sosialar veitingar úr øðrum londum kunnu somuleiðis verða skattaðar í heimlandinum hjá móttakaranum.

Sjúkrapeningur og aðrar útlendskar sosialar veitingar eru skattskyldugar í Føroyum og skulu uppgevast á føroysku sjálvuppgávuni.

## 3.9 Sjúkrapeningur úr Noreg

Sjúkrapeningur úr Noreg verður bert skattaður í Føroyum, um viðkomandi er búsitandi í Føroyum. Hetta er galdandi bæði fyri sjúkrapening, sum Folketrygden rindar, og fyri sjúkrapening, sum arbeiðsgevarin rindar.

Rætt til sjúkrapening úr Noreg hevur persónur, ið er limur í Folketrygden og hevur starvast í Noreg í minst 4 vikur, og sum vegna sjúku ella skaða er vorðin óarbeiðsførur, umframt at inntøkumissurin skal verða størri enn helvtin av árligu ásettu grundupphæddini hjá Folketrygden. Sjómenn hava rætt til sjúkrapening hóast teir hava starvast í minni enn 4 vikur umborð á norskum skipi. Sjómenn kunnu fáa sjúkrapening um teir eru óarbeiðsførir sum sjómenn, eisini hóast teir eru førir fyri at røkja annað starv.

# 4 Frádráttir í skattskyldugu inntøkuni

Persónar við uttanlandsinntøku hava rætt til ymiskar frádráttir í skattskyldugu inntøkuni. Frádráttur verður givin eftir hvat slag av inntøku viðkomandi hevur uttanlands. Frádráttirnir verða drignir frá uttanlandsinntøkuni áðrenn skattur verður roknaður.

## 4.1 Uttanlandsfrádráttur

Persónar, sum arbeiða uttanlands ella umborð á útlendskum skipi, fáa frádrátt upp á 30% av útlendsku inntøkuni. Frádrátturin kann tó í mesta lagi vera 120.000 kr. um árið, svarandi til 30% av 400.000 kr. Frádrátturin er sum útgangsstøði galdandi uttan mun til, um arbeitt verður uttanlands fyri føroyskan ella útlendskan arbeiðsgevara.

Frádráttur á 30% av útlendskari inntøku er tó ikki galdandi fyri manning á skipum, skrásett í FAS ella DIS ella í føroysku skipaskrásetingini annars.

Frádráttur á 30% av útlendskari inntøku er heldur ikki galdandi fyri fiskiveiðuinntøku frá skipum skrásett í øðrum Norðurlondum t.d. Noreg og Danmark. Somuleiðis er frádrátturin heldur ikki galdandi fyri inntøku frá norðurlendskum flogførum ella fyri sendifólk Føroya uttanlands.

Um útlendsk inntøka gevur rætt til 30% í frádrátti sambært omanfyristandandi, kunnu samdøgursfrádráttur og fiskimannafrádráttur ikki gevast í somu inntøku, sí niðanfyri.

## 4.2 Samdøgursfrádráttur

Persónar, sum hava inntøkugevandi arbeiði uttanlands ella umborð á útlendskum skipi, og sum ikki hava rætt til 30% í frádrátti av útlendsku inntøkuni, hava í staðin rætt til 300 kr. í frádrátti fyri hvørt samdøgur arbeitt verður uttanlands, umframt fyri ferðadagar í hesum sambandi. Frádrátturin er treytaður av, at persónurin er uttanlands ella umborð á útlendskum skipi í antin tveir mánaðir uttan slit ella í minsta lagi 100 samdøgur innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið.

## 4.3 Fiskimannafrádráttur

Fiskiveiðuinntøka verður lækkað við 14%, áðrenn skattur verður lagdur á inntøkuna. Tó er hægsti árligi frádrátturin 65.800 kr. svarandi til 14% av 470.000 kr. Frádrátturin er galdandi fyri allar fiskiveiðuinntøkur, sum bert Føroyar hava rætt til at skatta, herundir inntøkur hjá føroyskum persónum við føroyskum fiskiskipum og inntøkur hjá føroyskum persónum við fiskiskipum frá øðrum Norðurlondum.

Fiskiveiðuinntøka frá skipum, sum eru heimahoyrandi í eitt nú Grønlandi ella Canada, gevur ikki rætt til fiskimannafrádrátt. Persónar við tílíkum skipum hava í staðin rætt til 30% í uttanlandsfrádrátti, sí omanfyri.

Í sambandi við inntøku frá føroyskum fiskiskipum verður inntøkan lækkað við 14%, áðrenn skattur verður lagdur á inntøkuna. Í sambandi við fiskiveiðuinntøku frá útlendskum skipum skulu persónar sjálvir uppgeva inntøkuna og frádráttin á serligum oyðublaði, sum skal latast inn saman við sjálvuppgávuni.

## 4.4 Yvirlit yvir frádráttir í skattskyldugu inntøkuni

| | Fiskimanna-frádráttur (14%) | Uttanlands-frádráttur (30%) | Samdøgurðs-frádráttur (300 kr) |
|---|---|---|---|
| | | | |
| Arbeiði á landi uttanlands | - | + | - |
| Skip skrásett í DIS | - | - | + |
| Norðurlendsk fiskiskip | + | - | + |
| Onnur útlendsk fiskiskip | - | + | - |
| Útlendsk skip í kolvetnisvinnu | - | + | - |
| Útlendsk ferða- og farmaskip | - | + | - |
| Onnur útlendsk skip | - | + | - |
| Norðurlendsk flogfør | - | - | + |
| Onnur útlendsk flogfør | - | + | - |

## 4.5 Eftirlønarfrádráttur

Egin gjøld til føroyska eftirløn kunnu fádragast í skattskyldugu inntøkuni í tí ári tey eru goldin. Egin gjøld til føroyska eftirløn verða fráboðað til TAKS av viðkomandi tryggingarfelag ella peningastovni.

Gjøld til útlendska eftirlønarskipan av inntøku, sum er forvunnin fyri arbeiði uttanlands í starvi hjá arbeiðsgevara við heimstaði uttanlands, kann frádragast í skattskyldugu inntøkuni (egin gjøld) ella haldast uttanfyri skattskyldugu inntøkuna (arbeiðsgevarans gjøld).

# 5 Skattur í Føroyum

Inntøka fyri arbeiði uttanlands ella við útlendskum skipum verður sum útgangsstøði skattað við 35%. Áðrenn skattur verður roknaður, verður frádráttur veittur við 30% av útlendsku inntøkuni, tó í mesta lagi við 120.000 kr.

Inntøka umborð á norðurlendskum fiskiskipi, har bert Føroyar hava rætt til at skatta inntøkuna, verður skattað á sama hátt sum føroysk fiskiveiðuinntøka. Fiskiveiðuinntøka frá øðrum skipum enn norðurlendskum verður skattað eins og onnur inntøka fyri arbeiði uttanlands við føstum skattaprosenti á 35%.

Um skattur er goldin í øðrum landi av útlendsku inntøkuni, verður linking givin í føroyska skattinum sambært galdandi ásetingum í tvískattasáttmála ella skattalógini.

## 5.1 Linking fyri goldnan skatt uttanlands

Tá ið persónur hevur bústað í Føroyum, men tvískattasáttmáli ella skattareglur í øðrum landi áseta, at lønarinntøkan skal skattast í útlandinum, skal hendan inntøkan eisini uppgevast í Føroyum, men skulu Føroyar geva linking í føroyska skattinum. Harvið verður m.a. tryggjað, at møgulig føroysk inntøka ikki verður skattað lagaligari av teirri orsøk, at persónur eisini hevur útlendska inntøku í staðin fyri bert at hava føroyskar inntøkur.

Linking í sambandi við goldnan skatt uttanlands kann útroknast eftir tveimum háttum. Hesir verða nevndir eksemption hátturin og kredit hátturin.

## 5.2 Eksemption

Eftir hesum útrokningarhátti verður uttanlands inntøkan íroknað í skattskyldugu inntøkuna í Føroyum. Linking verður síðani givin í samlaða skattinum í Føroyum svarandi til lutfallið millum uttanlandsinntøkuna og samlaðu skattskyldugu inntøkuna.

*uttanlandsinntøka / samlað skattskyldug inntøka * føroyskan skatt*

Linkingin er ikki treytað av hvussu nógv er goldið í skatti uttanlands.

Exemption hátturin verður m.a. nýttur í sambandi við hesi sløg av inntøku:

- Lønarinntøka fyri arbeiði á landi í øðrum norðurlandi
- Lønarinntøka fyri arbeiði á boriplattformi í norðurlendskum sjógvi
- Lønarinntøka frá skipi undir DIS-skipani
- Lønarinntøka frá grønlendskum skipi ella flogfari

Linking verður eisini givin eftir eksemption háttinum, t.d. tá ið siglt verður við skipi í kolvetnisvinnu í norskum sjóøki og reiðaríið er heimahoyrandi í Noregi.

## 5.3 Kredit

Eftir hesum hátti verður útlendska inntøkan eisini tald við í skattskyldugu inntøkuna í Føroyum. Frádráttur verður síðani givin í samlaða skattinum í Føroyum svarandi til lutfallið millum uttanlandsinntøkuna og samlaðu inntøkuna. Tó kann frádrátturin hægst vera ájavnt við goldna skattin uttanlands.

*uttanlandsinntøka / samlað skattskyldug inntøka * føroyskan skatt*

*tó í mesta lagi ájavnt við goldnan skatt uttanlands*

Kredit hátturin verður m.a. nýttur í sambandi við hesi sløg av inntøku:

- Lønarinntøka á landi í Grønlandi
- Lønarinntøka á landi í Stóra Bretlandi
- Lønarinntøka fyri arbeiði umborð á skipum í altjóða ferðslu *(undantikið DIS)*
- Lønarinntøka fyri arbeiði umborð á supply skipum ið sigla uttanfyri norðurlond

Harafturat er ásett í føroysku skattalógini, at kredit hátturin skal nýtast í øllum øðrum førum, tá ið persónur hevur lønarinntøku frá londum, sum Føroyar ikki hava gjørt tvískattasáttmála við.

# 6 Sosial gjøld í útlandinum

Ásetingar í útlondum um skyldu at gjalda sosial gjøld kunnu vera ymiskar, eins og rættindi hjá persónum til at móttaka sosialar veitingar í útlandinum eisini eru ymisk.

Útgangsstøði er, at persónar sum arbeiða uttanlands, eru umfataðir av lóggávuni í arbeiðslandinum um sosial gjøld. Hetta kann viðføra, at persónur og møguligur føroyskur arbeiðsgevari skulu gjalda sosial gjøld í útlandinum. Í norðurlondum er meginreglan, at persónur er sosialt tryggjaður í arbeiðslandinum og rindar til sosiala trygd har.

Hóast meginreglan er, at sosial gjøld skulu gjaldast í arbeiðslandinum, og bert í arbeiðslandinum, áleggur føroysk lóggáva, at føroyskir persónar, sum hava útlendskar inntøkur, eisini skulu gjalda til Heilsutrygd í Føroyum. Hetta inniber, at føroyingar, sum gjalda til Folketrygd í Noreg, sum m.a. eisini fevnir um heilsutænastur í Noreg, verða samstundis eisini kravdir at rinda til Heilsutrygd í Føroyum. Ósemja er tó um hesi viðurskifti, og fyriliggur mál hjá Føroya Rætti at taka støðu til.

Sambært norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd ber í ávísum førum til at søkja um at sleppa undan sosialum gjøldum í arbeiðslandinum við teirri treyt, at ein er sosialt tryggjaður í heimlandinum. Ynskir persónur at verða undantikin at rinda til sosiala trygd í arbeiðslandinum skal viðkomandi venda sær til Almannaverkið.

Um persónur kann vísa á, at viðkomandi er sosialt tryggjaður og rindar til sosiala trygd í øðrum norðurlandi, hevur viðkomandi rætt til frádrátt fyri hesi gjøld í føroyska skattinum, eins og hevði viðkomandi goldið skatt í øðrum norðurlandi. Frádrátturin er einans galdandi fyri sosial gjøld sambært norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd.

Persónar, ið arbeiða í norðurlondum, kunna søkja TAKS um frítøku at rinda til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (Samhaldsfasta), treytað av at teir eru sosialt tryggjaðir í øðrum norðurlandi, tó undantikið Danmark.

## 6.1 Sosial gjøld í Noreg

### Folketrygd

Sum meginregla eru øll, ið arbeiða í Noreg, limir í norska Folketrygden. Um arbeitt verður á norska landgrunninum ella umborð á norskum skipi, hevur viðkomandi somuleiðis skyldu at verða limur í Folketrygden.

Limir í Folketrygden hava skyldu at rinda trygdeavgift. Gjaldið verður kravt saman við skattinum og fevnir um gjald til ymsar sosialar skipanir í Noreg. Gjaldið til Folketrygd verður ásett sum prosentpartur av bruttolønini eftir ymiskum satsum, sí niðanfyristandandi yvirlit.

| Satsir Folketrygd 2020 | |
|---|---|
| Løn fyri arbeiði á landi í Noreg | 8,20% |
| Løn fyri arbeiði í kolvetnisvinnu á norskum sokkli | 8,20% |
| Løn fyri arbeiði í kolvetnisvinnu uttanfyri norskan sokkel | 8,20% |
| Pensjóns útgjøld | 5,10% |
| Øll inntøka til persónar yvir 69 ár | 5,10% |

Føroyskir sjómenn við norskum fiskiskipum verða ofta trektir 10% í Folketrygd gjøgnum árið. Í endaligu norsku skattauppgerðini, eigur hetta tó at verða rættað niður til 8,2%.

### Pensjonstrygd for sjømenn (PTS)

Ríkisborgarar í EU/EØS, ella persónar búsitandi í norðurlondum, ið arbeiða umborð á skipi í norsku skipaskrásetingini (NOR ella NIS), ið er yvir 100 bruttotons, rinda til PTS. Sjómenn umborð á skipum, ið eru undir 100 bruttotons, skulu í ávísum førum eisini rinda til PTS.

Við virkna frá 1 januar 2020 eru pensjónsviðurskiftini í PTS deild í tvær skipanir, og eru tí ymsar treytir knýttar at inngjaldi, alt eftir um limurin er føddur áðrenn ella eftir 1970.

Inngjaldið hjá limum, føddir áðrenn 1970, verður roknað sum prosentpartur av grundupphæddini av Folketrygden. Yvirmenn, so sum skiparar, stýrimenn og maskinmeistarar rinda 1,17% av grundupphæddini av Folketrygden, meðan dekkarar rinda 0,91% av grundupphæddini av Folketrygden. Grundupphæddin av Folketrygden verður javnað árliga.

Inngjaldið hjá limum, føddir eftir 1970, er 1,70% av bruttolønini, tó í mesta lagi 1,70% av grundupphæddini av Folketrygden.

| PTS | |
|---|---|
| Sjómenn føddir eftir 1970 | 1,70% av lønarinntøku |
| Yvirmenn - føddir áðrenn 1970 | 1,17 % av folketrygd grundupphædd |
| Dekkarir  - føddir áðrenn 1970 | 0,91 % av folketrygd grundupphædd |

Flestu persónar, sum sigla alt árið, gjalda millum 900 NOK og 1.200 NOK um mánaðin til PTS.

# 7 Gjald til eftirløn í Føroyum

Í eftirlønarlógini er ásett, at allir persónar, sum ikki hava nátt pensjónsaldur, og sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, skulu gjalda til egna eftirløn hjá føroyskum eftirlønarveitara.

Persónar, sum arbeiða hjá útlendskum arbeiðsgevara, hava somuleiðis skyldu at rinda til egna eftirløn. Eftirlønargjaldið verður kravt inn við rokning árið eftir inntøkuárið. Eftirlønargjaldið verður roknað av brutto lønarinntøkuni frá útlandinum. Eftirlønargjaldið verður síðani frádrigið í skattskyldugu inntøkuni í tí ári tað fellur til gjaldingar.

Tá ið eftirlønargjaldið er goldið, verður eftirlønarskattur á 40% trektur frá, og nettoupphæddin verður síðani flutt á eftirlønarkonto. Í hesum sambandi verður frádráttur fyri inngjaldið givið í skattskyldugu inntøkuni fyri árið, ið eftirlønin er goldin.

Persónar, sum rinda til føroyska eftirløn av inntøku, sum er forvunnin uttanlands, verða góðskrivaðir í føroyska eftirlønarskattinum fyri inntøkuskatt, sum er goldin av eftirlønargjaldinum uttanlands. Niðanfyri er víst dømi uppá hvussu eftirlønargjaldið verður útroknað hjá persóni, sum rindar skatt uttanlands.

Eftirlønargjald, goldið undanfarin ár til og við 2019 varð roknað sum víst niðanfyri.

| **Eftirlønargjald í 2019** | |
|---|---|
| Lønarinntøka uttanlands | 800.000 |
| Goldin inntøkuskattur uttanlands (25%) | 200.000 |
| | |
| Tvungið eftirlønargjald í Føroyum (4%) | 32.000 |
| Harav flutt til eftirlønarkonto (32.000 x 60%) | 19.200 |
| | |
| Eftirlønarskattur í Føroyum (32.000 x 40%) | 12.800 |
| Goldin skattur uttanlands av eftirlønargjaldinum (32.000 x 25%) | 8.000 |
| Eftirlønarskattur at rinda í Føroyum (12.800 - 8.000) | 4.800 |
| | |
| Samlað eftirlønargjald í Føroyum (19.200 + 4.800) | 24.000 |

Í 2020 er útrokningarhátturin av eftirlønargjaldinum broyttur. Í staðin fyri at eftirlønargjaldið verður lækkað við útlendska skattinum, verður upphæddin, ið svarar til útlendska skattin, flutt á eftirlønarkonto hjá viðkomandi persóni. Skattur goldin uttanlands verður tó framvegis góðskrivaður í føroyska eftirlønarskattinum.

Eftirlønargjald at rinda í 2020, umframt eftirlønargjøld at rinda framyvir verða roknað soleiðis.

| Eftirlønargjald í 2020 | |
|---|---|
| Lønarinntøka uttanlands | 800.000 |
| Goldin inntøkuskattur uttanlands (25%) | 200.000 |
| | |
| Tvungið eftirlønargjald í Føroyum (5%) | 40.000 |
| | |
| Eftirlønarskattur í Føroyum (40.000 x 40%) | 16.000 |
| Goldin skattur uttanlands av eftirlønargjaldinum (40.000 x 25%) | 10.000 |
| Eftirlønarskattur at rinda í Føroyum (16.000 - 10.000) | 6.000 |
| | |
| Flutt til eftirlønarkonto (40.000 – 6.000) | 34.000 |
| | |
| Samlað eftirlønargjald í Føroyum (34.000 + 6.000) | 40.000 |

Einans goldin inntøkuskattur uttanlands kann mótroknast í føroyska eftirlønarskattinum. Sosial gjøld uttanlands, t.d. gjøld til folketrygd og PTS, kunnu ikki mótroknast í føroyska eftirlønarskattinum.

Eftirlønargjaldið kann frádragast í skattskyldugu inntøkuni í tí ári tað er goldið.

## 7.1 Frítøka fyri at gjalda til føroyska eftirløn

Persónar við uttanlandsinntøku kunnu søkja TAKS um frítøku fyri at rinda til føroyska eftirlønarskipan av uttanlandsinntøkuni, um teir rinda til útlendska eftirlønarskipan sum liður í teirra starvssáttmála.

Frítøkan er treytað av:

- At útlendski arbeiðsgevarin váttar, ella at setanarbræv vísir, at persónurin er álagdur at rinda til útlendska eftirlønarskipan, og
- At arbeiðið er útinnt uttan fyri Føroyar, og
- At TAKS metir, at útlendska eftirlønarskipanin er nøktandi

Persónar, sum hava fingið játtað frítøku, skulu á hvørjum ári lata TAKS eitt ársyvirlit yvir gjøld til útlendsku eftirlønarskipanina saman við sjálvuppgávuni. Hetta verður gjørt við at útfylla fylgiskjal 791. Um útlendska eftirlønarskipanin ikki verður mett at vera nøktandi, verður ásetta føroyska eftirlønargjaldið kravt við rokning.